# KT í undirvísingarhøpi

***við serligum atliti at samskifti og netmentan***




KT-varðaútbúgvingin
Verkætlanin
Tórhallur Simonsen

# Innihaldsyvirlit


Inngangur 3

Ymsir samskiftishættir 4

- Vanligur teldupostur 4
- Ókeypis teldupost-adressur 4
- Dulnevnt kjak (chat) 5
- FirstClass og SamHøll 5
- Tíðindabólkar (Newsgroups) 6
- SMS 6
- Annað 6

Mentanarfatan, upplýsing og málslig innlæring 7

- Mentanir hittast 7
- Landafrøðilig og søgulig fatan 7
- Málslig menning 7

Tykissamfelagið (skúlastovan) 8

- Samtarv um kommunu-/landamark 8
- Royndir í øðrum londum 8
- Tykisskúlastovan 9
- Tykissamfelagið í Svínoy 9

Netmentan (netiqette) 9

- Ein lýsing av hugtakinum 9
- Virginia Shea 10
- Skúlans politikkur 10

Kanning 11

Niðurstøða 12

Keldulisti 13

Bilag: Netiquette bye Virginia Shea 14

Bilag: Spurnarblað um teldunýtslu 16

# Inngangur

Teldan fær alsamt størri leiklut í samfelag okkara, og skulu vit menna næmingarnar til at taka við teimum avbjóðingum, ið samfelagið kemur at geva teimum eftir lokna tíð í fólkaskúlanum, er, eftir mínum tykki, neyðugt at nýta telduna innan skúlans gátt, soleiðis at næmingurin venist við at nýta hana sum amboð til tær dagligu uppgávurnar, tað verið seg heima við hús, innan skúlagátt ella á arbeiðsplássinum.
Eg haldi, vit eru á rættari leið, tá vit læra næmingarnar tey grundleggjandi forritini so sum tekstviðgerð, rokniark o.t. eins og vit gera næmingin kunnugan við sjálva telduna.
Tað finnast hópin av forritum, ið kunnu vera eitt gott ískoyti til dagligu undirvísingina í flestu lærugreinum, tað verið seg mál, kunningarlærugreinirnar, støddfrøði o.a.
20 øld hevur ofta verið nevnt kunningaröldin og vit hava fingið eitt kunningarsamfelagið. At leita sær vitan og at skifta vitan hevur fingið alstóran týdning í samfelag okkara og kemur óivað at fáa enn størri týdning framyvir, tí eiga vit eisini, sum eitt ískoyti til bókasøvnini, at læra næmingarnar at nýta alnótini til at leita sær vitan og ikki minst spyrja seg sjálvar í hvønn mun keldan er eftirfarandi, tað sum á fakmáli eitur keldukritikkur. Sum ein liður í hesi menning, er stungið út í kortið at seta á stovn námsfrøðiligan tænastudepil á skúlunum, men her væntar enn nógv, tí karmarnir nógva staðni ikki eru í lagi. Teldan hevur eisini fyri ein part avloyst vanligt postsamband og telefonsamskifti, samstundis sum møguleikarnir fyri margmiðlasamskifti økjast, soleiðis at tað sum frálíðir fer at bera til at samskifta við myndum, skrift og/ella ljóði samstundis, við rímuligari góðsku og ferð.
Tá støða skuldi takast til verkevni, rann mær í hug teir stóru møguleikarnar, ið eg meti liggja í samskiftisforritinum FirstClass, og fall tað mær tískil náttúrligt at velja samskifti sum høvuðstátt í verkætlan míni, hóast sumt av tí omanfyrinevnda enn hoyrir framtíðini til, og FirstClass ikki inniheldur allar møguleikarnar samstundis.
Eitt, sum eisini hugtekur meg, er møguleikin fyri tí virtuellu skúlastovuni ella tykisskúlastovuni. Mær rennur í hug tað australska skúlaradiosamskifti og kundi hugsað mær at kanna, um teir eru komnir víðari á hesum økinum. Eisini ætli eg mær at kanna royndarverkætlanir í oyggjasamfeløgum í Danmark og hvussu tað gongur í Tykissamfelagnum Svínoy.
Eingin vælferð uttan avleiðingar. Samfelag okkara er sum heild vorið meiri tolsamt í samband við harðskap og porno. Filmir, ið vóru bannaðir í 70'unum, verða í dag vístir í sjónvarpinum. Eru vit vorðin alt ov immun ella tilvand? Skulu vit seta mørk og í so fall hvørji og hvussu?
Tað er blivið sera væl umtókt millum næmingarnar at fáa sær eina ókeypis teldupostadressu á Alnótini. Hon hevur eisini tann "fyrimun", at tú kanst vera annonymur ella huldufólk.
Eisini dáma næmingunum væl eitt sum eitur mIRC, har møguleiki er at samskifta (chatta) beinleiðis við onnur í "real time" annonymt. Eitt av teimum væl dámdu støðunum er Faroe_Chatt og onnur tí lík.
Hvørjar avleiðingar hevur hetta fyri moralin og etikkin? Eiga vit at hava eina sokallaði net-etikkettu ella netikettu? Eiga vit at bannað tílíkum forritum í skúlahøpi?
Annað vælumtókt millum børn og ung er at senda SMS. Kunnu vit gagnnýta hetta í skúlahøpi?
Eg havi spurt næmingar og lærarar okkara, hvørji forrit teir nýta, og hvørja støðu teir havi til tey ymsu forritini og møguleikarnar hjá næmingunum at vitja minni penar heimasíður, so sum heimasíður við harðskapi, rasismu, nazismu, ateismu og porno.
Hóast vit kunnu fáa gleði og nyttu burtur úr telduni, eiga vit ikki at gloyma okkum burtur í tøknini og halda, at teldan avloysir tað vanligu undirvísingina, og at teldan loysir allar trupulleikar og alt samskifti. Tey eru nógv, ið heldur vilja senda ella móttaka eitt hondskriva jólakort, tað er líkasum meiri persónligt. Eisini man vera betur at støkka inn á gólvið hjá ommu, heldur enn at senda henni teldupost ella SMS. Teldan kemur helst ongantíð at kunna avloysa tað persónligu samveruna. Tann dagin vit fyrigykla okkum, at hon er før fyri tí, eru vit helst komin ov langt frá veruleikanum.

# Ymsir samskiftishættir

Tá um samskifti ræður, eru tveir hættir at skipa viðgerðina uppá. Antin allýsa vit tørvin og kanna síðan , hvørjir møguleikar eru, ella allýsa við samskiftisskipanirnar og viðgera, hvørjir møguleikar til samskifti liggja í teimum. Upprunaliga hugsan mín, tá eg valdi mær evni, er tað seinna, men uppgávuorðingin kann av summum metast at liggja nærri tí fyrra. Helst skuldi uppgávuorðingin verið: KT í undirvísingarhøpi – við serligum atliti at samskiftis*møguleikum* og netmentan.

## Vanligur teldupostur

Kanska eitt heldur ivasamt heiti, men her verður hugsað um tað slagið av telduposti, ið tey flestu nýta, tí heiti: Vanligur teldupostur. Í dag má **Outlook Express** metast at vera mest nýtta forrit til teldupost. Ikki tí at fólk flest meta hetta at vera tað besta, men mest tí at teir, ið framleiða teldur og forrit hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at vinna hesum forriti frama, soleiðis at tað í dag fylgir við mongum nýggjum teldum.

Forritið er ein partur av Alnót-kaganum Microsoft Internet Explorer, ið fylgir við Windows og eisini er at finna ókeypis á Alnótini og mangari teldufløgu, ið fylgir við onkrum at teimum mongu teldubløðunum. Seinasta útgávan eitur 5.5, men 6.0 fæst í eini beta-útgávu, altso royndarútgávu.

Vanligasta nýtslan er at hava eitt Alnóta-hald frá Føroya Tele, tað ber eisini til at leggja eina Hotmail-adressu í forritið. Nýtir tú t.d. Windows 98 og tað eru fleiri brúkarar við hvør sínari adressu, liggur telduposturin hjá øllum samanvavdur. Tað ber tó til at víðariflyta postin beinleiðis í ávísa mappu, men øll hava atgongd til allan post. Posturin verður vanliga heintaður inn á telduni, tú nýtur og strikaður á post-ambætaranum, Eisini er vandi fyri, at telduposturin hevur skeivan avsendara, tí ein av brúkarunum er standard, um hetta ikki verður broytt hvørja ferð. Forritið inniheldur adressulista, soleiðis at ikki er neyðugt at skriva áður nýtta adressu av nýggjum.

Hetta forrit er vælegnað til heimabrúk, men má av omanfyri nevndu trupulleikunum metast at vera rættuliga óegnað í skúlahøpi.

Outlook Express hevur ein stórabeiggja, ið eitur Outlook. Tað inniheldur eisini ráðleggingar-kalendara, gerðarlista, víðkaðan adressulista og møguleika fyri at skriva notur. Annars eru trupulleikarnir teir somu sum við Outlook Express, tó so, til ber við at nýta Windows 2000 at hava postin atskiltan.

Ert tú staddur við aðra teldu ella í kanska í øðrum landi, ber til at fara inn á eina heimasíðu hjá Føroya Tele, ið eitur www.portal.fo/web , at lesa nýggjan post.

## Ókeypis teldupost-adressur

Á Alnótini er hópin av ókeypis teldupost-adressum at fáa. Skipanin er tann, at tú fert inn á heimasíðuna hjá eini alnóta-fyritøku, ið bjóðar henda møguleika og meldar teg til, velur sjálvur eyðkenni fyri teldupost-adressuna, meðan seinni partur av adressuni er knýttur at fyritøkuni, ið bjóðar henda møguleikan. So er upp til tín, um tú upplýsir títt kristna navn ella heldur vilt vera huldufólk. Hesin postur verður liggjandi á post-ambætaranum og kann lesast aftur og aftur, til tú strikar hann, líka mikið hvørja teldu tú nýtir, bert tú hevur samband við alnótina.

Tøkniliga ber til at nýta hesa skipan í skúlahøpi, men trupult er at hava skipaði viðurskifti eins og tað kann føra til etiskar spurningar, ið eg komi inn á seinni í verkætlanini.

Eitt tað mest nýtta er www.hotmail.com, ið Microsoft eigur, men www.yahoo.com og www.jubii.dk eru eisini nógv nýtt eins og fleiri onnur.

# Dulnevnt kjak (chat)

Forritið **mIRC** (Internet Relay Chat) er sera væl umtókt millum børn og ungdóm. Tú meldar teg til undir dulnevni og sleppur so at luttaka í almennum ella privatum kjaki. Skipaninar hava eina fyrisiting. Tað eru vanliga tey, ið brúka skipanina nógv, ið sleppa at stýra og fyriskipa, soleiðis, at ávíst støði verður hildið. Her verður hugsað um tað sett av reglum, ið skal haldast, tann sonevnda netikettan.
Til ber eisini at luttaka í slíkum kjaki uttan at hava nevnda forrit. Tá verður farið inn á ávísa heimasíðu at melda seg til. Eitt tað best umtókta kjaktorgið er Faroe_Chatt.
Tøkniliga ber til at nýta hesa skipan í skúlahøpi, men trupult er at hava skipaði viðurskifti eins og tað kann føra til etiskar spurningar, ið eg komi inn á seinni í verkætlanini.

# FirstClass og SamHøll

Kanadiska fyritøkan SoftArc, seinni **Centrinity**, hevur framleitt eitt samskiftisforrit, ið eitur **FirstClass**. Forritið er ætlað til samskifti í smærri og størri fyritøkum, bæði nær- og fjarnet.
Skipanin er tann, at allir brúkarar eru tilmeldaðir ein FirstClass-ambætara, ið stýrir skipanini. Brúkarin nýtir so ein sokallaðan klient, ið er ókeypis. Fyrisitingin ger av, hvør sleppur at brúka skipanina, og hvar og hvat brúkarin hevur atgongd til og loyvi at gera. Allir brúkarir eru skrásettir við sínum kristna navni og lættir hetta um samskifti. Hetta er tó bert um tú sendir post til onkran, ið er í skipanini. Skalt tú senda ella móttaka post uttanfyri skipanina, er neyðugt at nýta ávísa teldupost-adressu, ið tú hevur fingið upplýst.
Umframt teldupost, eru eisini møguleikar fyri kjaktorgi og kalendara. Umframt tað vanliga at síggja, nær postur er sendur, ber til at síggja, hvør hevur lisið og nær, sent víðari ella heintað viðfesta fílu. Kalendarin kann nýtast sum ein avtalu, hølis- ella tilfengiskalendari, soleiðis at tað eisini ber til at samskipa og stýra nýtsluni av einum høli ella amboði.
Tá tú setir forritið í gongd, kemur fram eitt sokallað skriviborð, har tú hevur tín persónliga postkassa, umframt mappur, kallaðar stevnur, sum tú hevur atgongd til at lesa og møguliga eisini at skriva í. Hesar stevnur hava sum mið at øll tey, ið hoyra til ávísan áhugabólk ella felagsskap hava eitt forum, har tey kunnu hittast.
Føroyski skúlamyndugleikin tók stig til at seta á stovn **KT-depilin**, og er tað hann, ið umsitir hesa skipan. Skipanin hevur fingið heitið **SamHøll**. Málið var og er, at allir lærarar og næmingar í Føroyum eru limir í hesi skipan, og man tað líða rættiliga væl. Danska fyritøkan **Rabbe Consult**, ið hevur latið okkum skipanina, sigur á heimasíðu síni, at <u>Føroyar eru fyrsta land í heiminum, har allir næmingar hava fingið teldupost-adressu</u>. Hevur tú ikki forritið, ber í staðin til at nýta ein kaga til endamálið. SamHøll er at finna á www.skulin.fo/login
Av tí at tað er gjørt eitt miðvíst arbeiði við at geva øllum næmingum fólkaskúlans hvør sína adressu og at hetta er ókeypis fyri tann einstaka, hevur tað tikið rímiliga stutta tíð at útbreiða forritið, og skúlarnir hava fingið sama samskiftisstøði at standa á og meti eg hetta at vera ein stóran fyrimun, ikki minst tí at um næmingurin skal senda øðrum næmingi bræv, er jú bert neyðugt at kenna hansara kristna navn.
Annar fyrimunur er, at um t.d. 2 flokkar í 2 skúlum ætla at samstarva um eitthvørt, so er bert at senda eina umsókn til KT-depilin um at fáa eina stevnu til endamálið. Allur postur hesum arbeiði viðvíkjandi er so at finna á sama stað.
Allur postur og annað tilfar verður liggjandi á ambætaranum hjá KT-deplinum, so tað er líka mikið, hvørja teldu, tú nýtir, tað verið seg innan ella uttan skúlagátt. Tó er hámark sett á, hvussu nógv tann einstaki kann goyma vegna plásstrot, ella sagt á annan hátt, skulu allir kanska 10.000 brúkararnir goyma fyrilitarleyst, krevur hetta jú ómetaliga stóra goymslu.
Tað tykist mær sum, at henda skipan er sera væl egna til skúlabrúks, tí alt er á einum stað, lætt er at finna adressur og ikki minst, har er einki hulduvirksemi, øll noyðast at leggja sítt kristna navn

til. Á ein hátt tykist hon skræddaraseymað til skúlans tørv. Eisini er tað ein góður stuðul, at fyrisitingin stuðlar og vegleiðir og roynir at finna tær frægastu loysnirnar til hvørt høvi.
Tó at skipanin nøktar dagsins tørv, kann vera, at krøvini seinni ikki kunnu uppfyllast við verandi útgávu av forritinum. Her verður hugsað um at samskifta beinleiðis við ljóði og livandi myndum, men tað kann jú henda, at hetta kemur við í eini seinni útgávu. Seinasta útgávan eitur 5.623.

## Tíðindabólkar (Newsgroups)

Henda skipan er ætlað sum hjálp til sjálvhjálp. Hevur tú tørv á onkrari vitan, ber til at hyggja inn í eina slíka og har kanska finna svarið. Eisini ber til at spyrja og so vóna at onkur kennir svarið og tímir at svara. Til munnu vera nógvar tíggjutals túsund slíkar, ið eru skipaðar eftir evni og tað skuldi borið til at funnið onkra, ið viðger tíni áhugamál. Enn er einki av týdningi sett á stovn av hesum slag her á landi.
Stevnuskipanin í SamHøll kann í ávísan mun avloysa hesa skipan, men í SamHøll eru tað nærum einans skúlaviðurskifti, ið eru til viðgerðar. Treytin fyri at ein slík stevna í FirstClass kann gerast væleydnað sum avloysari ella kappingarneyti hjá hesum tíðindabólkum, er, at so nógv sum møguligt hava atgongd, í minsta lagi øll tey, ið hava samanfallandi áhugamál, tí tað er sjálvt grundarlagið undir eini slíkari skipan. Tað kann mangan tykjast, at vit føroyingar eru heldur fáir til at fáa eitt nóg breitt grundarlag og tí er tað bert at frøast yvir, at vit nú hava atgongd til lærugreinastevnurnar hjá SkoleKom, ið er danska útgávan av SamHøll. Næsta stigið kann so vera, at rúm verður fyri øllum føroyingum innan SamHøll við atgongd til stevnur við alskyns evnum.

## SMS

SMS (Short Message Service) er sera væl umtókt millum børn og ungdóm. Henda skipan er komin saman við teimum nýggju GSM-fartelefonunum. Til ber at senda boð til eina teldupost-adressu og øvugt, eisini ber til at senda boð til eina telefon frá eini heimasíðu.
Ilt er at meta um álvaran í verandi SMS-samskifti hjá børnum og ungdómi okkara, men tá hugurin at senda SMS er so góður, hava skúlamyndugleikar í Bretlandi sett í gongd eina roynd við at nýta hesa skipan til at menna næmingar, ið hava lítlan hug og førleika at skriva. Til ber jú eisini at senda til og móttaka teldupost í telefonini.

## Annað

Her kann vera talan um upplýsandi tilfar, ið skúlar/flokkar leggja á heimasíðu sína, við tí greiða setningi, at aðrir skúlar/flokkar verða kunnaðir um hetta tilfar og fáa innbjóðing til at vitja heimasíðu teirra.
Eitt tað nýggjasta stjørnuskotið á samskiftishimmalinum verður á enskum kallað **Community**, á føroyskum *samfelag* ella *felagsskapur*. Hetta er sprottið úr teimum kagagrundaðu kjaktorgunum, men kann so nógv annað og meiri. Tey eru fleiri í tali, men fari eg at taka eitt av teimum fram, nevniliga www.hotbucket.dk. Til ber at senda beinleiðis boð til hinar luttakararnar, SMS, teldupost og tíðindabrøv, umframt sjálvandi at "chatta". Tú kanst hava adressubók, kalendara, mappur (fotoalbum, fílusavn og slóðir), uppgávulista og mangt annað, umframt eina stevnuskipan líknandi henni í FirstClass. Eisini ber til at koma inn á kalendaran gjøgnum WAP. Hevur tú ikki atgongd til eina FirstClass-skipan, ella tú metir, at hon ikki nøktar tørv tín, tykist mær, at hetta er ein virðiligur kappingarneyti.

# Mentanarfatan, upplýsing og málslig innlæring

# Mentanir hittast

Upplýsing er vegurin til tolsemi. Hvussu ofta hoyra vit ikki fólk úttala seg niðursetandi um eitthvørt, tey hava ongan ella lítlan kunnleika til, og seinni, tá kunnleikin er vorðin størri, broyta meining. Talan kann m.a. vera um fólkasløg, mat, tónleik og mentan annars. Hvussu nógv stríð og ósemjur, vit høvdu verið spard fyri, er ilt at meta um, men helst er tað ikki smávegis.
Møguleikarnir í skúlunum at nema sær kunnleika um hesi viðurskifti hava bert verið í bókum, á filmi og tilíkum. Onkur hevur havt brævaskifti við næmingar frá øðrum mentanum, men má hetta helst roknast sum eitt undantak. Alnótin gevur okkum heilt aðrar og øktar møguleikar. Brádliga ber til, heilt tilvildarliga, at koma á tal við næmingar úr øllum heiminum, uttan at hava gjørt avtalu um hetta frammanundan. Internetið knýtir okkum ikki bara saman tøkniliga, men eisini ymisk fólkasløg og mentanir.

# Landafrøðilig og søgulig fatan

Í dag verður ofta havt fyri munni, at bókin eg gomul tann dagin, hon kemur út, men hetta ber bert til at siga, um vit hava okkurt annað at samanbera við, ið er feskari. Tað er her, Alnótin kemur inn í myndina. Flestu lond hava í dag upplýsandi heimasíður um land teirra, og mangir skúlar hava eisini fingið sær heimasíður, ið geva eina kunning um sjálvan skúlan, virksemi hansara og møguliga eisini um nærumhvørvið, altso bygdina, býin og / ella okkurt mentunarligt ella søguligt. Til ber at lesa um og møguliga síggja, hvat næmingarnir hava avrikað í skúlanum, og í summum føri ber eisini til at fáa avrit av hesum kveikjandi tilfari.
Alnótin gevur okkum sostatt framúrskarandi møguleikar at gera okkum kunnug við onnur lond, bæði landafrøðiliga, søguliga og á øðrum økjum. Ofta eru hesar heimasíður knýttar at ferðavinnuni, og onkur hevur møguliga hug at seta spurning við sannleikavirði, men tað skerst ikki burtur, at tær ofta eru sera upplýsandi og ikki minst feskar, tó tað sum kunnugt kann vera sera ymiskt. Men umframt hópin av privatum heimasíðum um slík evni, finnast tað eisini mangar almennar, ið burdu verið eftirfarandi.
Hugsa vit um tær stóru broytingarnar, ið farnar eru fram í Evropu seinastu árini, nyttar lítið at fara í eitt rímiliga nýtt atlas ella alfrøði. So tað er avgjørt mikið læittari og betri í t.d. lærugreinunum landalæru og søgu at fáa fatur á teimum seinastu hagtølunum.
Eg havi sjálvur annar sum lærari í vár gjørt eina større uppgávu um Ísland saman við einum 5. flokki. Hetta er liður í eini kapping um at vinna eina ferð til Íslands at vitja ein skúlaflokk frá vinarbýi okkara, og sami flokkur vitjar so aftur hendan vegin. Avgerðin fellir um stutta tíð, og er so ætlanin, at vinnandi flokkarnir hittast á Alnótini og / ella við telduposti. Tað hevði verið torført, fyri ikki at siga ómøguligt at loyst hesa uppgávu á nøktandi hátt, soleiðis at hon umboðaði Ísland á besta hátt í dag við teimum feskastu hagtølunum. Hesi funnu vit m.a. inni á heimasíðuni hjá Hagstofu Íslands.
Men ongin bók, filmur ella Alnót kann síðustillast við tað at hava beinleiðis samband við fólki í einum landi. Næst tí at vitja landið sjálvt, kemur beinleiðis samskifti.

# Málslig menning

Í málundirvísing, eru nógvir møguleikar við at nýta Alnótina og samskifti. Ongantíð læra vit málið betur, enn tá vit samskifta við fólk, ið hava málið sum upprunamál, og tí kann tað vera eitt gott ískoyti til málundirvísingina at bera so í bandi, at næmingarnir taka upp samband við næmingar úr landinum. Fyrimunirnir eru tvinnir. Tú hevur beinleiðis samband við málið á gøtuni, umframt at hetta er sera kveikjandi fyri teir næmingar, ið hava lítlan førleika og lítlan ella ongan hug at læra

málið gjøgnum bókina. Vit síggja ofta tann skriviveika og dovna næmingin bráddliga sita so hugagóður og skriva, og skjótt mennist skrivingin.
Hugurin at vitja enskmæltar heimasíður tykist eisini góður, og kveikjandi kann vera at fara í holt við eina uppgávu, har tilfari skal finnast á Alnótini, sjálvandi havandi keldukritikkin í huga.

# Tykissamfelagið (tykisskúlastovan)

## Samtarv um kommunu-/landamark

Upprunin, til at eg valdi hetta evnið sum part av verkætlanini, er tann, at vit tríggir Mikkjal Mikkelsen og Nick Juul Thomsen og eg á vári 2000 fóru undir eitt samskifti millum Eysturskúlan, Venjingarskúlan og Miðvágs- Sandavágs skúla. Vit ætlaðu at finna útav, hvussu tú kundi skipa bólkarbeiði tvørtur um kommunumark soleiðis at skilja, at ein næmingur úr hvørjum skúla myndaðu hvønn arbeiðsbólkin. Vit vóru allir lærarar í donskum í 9. flokki og valdu at nýta lýsingar sum arbeiðsevni. Stevna bleiv stovnað í SamHøll, lýsingar ljóslisnar og lagdar í stevnuna. Ætlanir var so at bólkurin hittist í einum kjakrúmi (chatrum) at røða um lýsingarnar og arbeiðstilfarið skuldi so leggjast í stevnuna við telduposti ella "leggjast upp", soleiðis at hinir bólkarnir kundu lesa tað. Hvør flokkur kundi so prenta sær eitt eintak av øllum tilfarinum til nýtslu í skúlastovu teirra. Eg hevði kensluna av, at arbeiðið var væl og virðiliga komið í gongd, tá verkfallið stóra legði ætlanir okkara í sor. Tá verkfallið var av, vóru ikki stundir at arbeiða víðari, tí tá stundaði til próvtøku. Talan kundi verið um at tikið arbeiði uppaftur eftir summarsteðgin, men tað bar so á, at ongin okkara helt fram við lærugreinini í 10. flokki, og bleiv hetta sostatt slept. Spell, tí eg trúgvi veruliga uppá, at tað letur seg gera at arbeiða á henda hátt.

## Royndir í øðrum londum

Tá tosað verður um fjarundirvísing, er Australia eitt av undangongulondunum. Landið er stórt og fólkið úti á landinum býr ógvuliga spjatt á teimum stóru gørðunum. Tað var ikki hugsingur um at savna allar næmingar í skúlabygningum, og fóru teir tí undir fjarundirvísing við radiosendarum, og hava teir havt stóra gleði av hesum.
Fyrstur av hesum skúlum var "The Alice Springs School of the Air" í 1951. Undirvísingin fer fram dagliga yvir radiosamskifti, telefon, fax og teldupost. Video verður eisini nýtt. Lærararnir vitja næmingin minst eina ferð um árið. Meiri fæst at vita á http://www.assoa.nt.edu.au
Tá so menningin av Alnótini tók dyk á seg, birtist brátt hugurin at royna hesa leið, tí tað gamla radiosambandið gav jú ikki møguleika til at flyta annað enn tað talaða orðið. Men tað hevur gingið heldur smátt, tí telefonsambandið er rættiliga vánaligt úti á landinum, men teir hava nú ætlanir um at skipa hetta yvir fylgisvein.
Ein tvørfaklig telduposta-verkætlan millum teir 5 smá oyggjaskúlarnar Agersø, Lyø, Omø, Strynø og Venø við tí endamáli at styrkja førleikan hjá næmingunum í at nýta teldupost og at roynda fjarundirvísing eydnaðist stak væl ífylgi niðurstøðu teirra. Vilt tú vita meira, ber til at fara inn á heimasíðuna: http://www.uvm.dk/fsa/infotek/indhold/eks/002/bt.htm
Dømini, eg her havi tikið, eru 2 av óteljandi royndum runt alla verðina. Danir vísa á nógvar royndir á
http://www.uvm.dk/fsa/infotek/indhold/infotek.htm

## Tykissamfelagið í Svínoy

Fyri at royna hesa nýggju kunningartøknina í einum heilum lokalsamfelag, fíggjaði táverandi UMMS eina verkætlan, har Svínoyar skúli er miðdepilin í einum tráðleysum nærneti, har nærum

øll bygdin er við. Á skúlanum stendur ein ambætari og skálantenna. Tey luttakandi húskini hava so hvør sína lítla skálantennu og sleppa gjøgnum ambætaran út á eina 2 Mbit linju til Alnótina. Næmingarnir sita í stóran mun heima og nýta ambætara skúlans sum ein fílu-ambætara. Eg spurdi, um nakað samskifti var millum heim og skúla gjøgnum hetta nærnet, men so var ikki.
Eg setti meg í samband við stigtakaran, Jógvan Edmund á Geilini, og greiddi hann soleiðis frá:
"Okkara næmingar fingu atgongd til SkoleKom og hava havt nakað av samskifti við ein skúlaflokk í Åbenrå. Hetta samskiftið er farið fram bæði við telduposti og kjaki (chat). Tey hava greitt hvørjum øðrum frá landi sínum, og eg haldi, at nakað er komið burturúr.
Eftir summarsteðgin fara vit í holt við eina størri verkætlan, har smáir skúlar í øllum Norðurlondum skulu samskifta um siðvenjur (traditiónir) í Norðurlondum. Svínoyar skúli kemur mest at samskifta við ein lítlan skúla í skergarðinum á Álandi. Úrslitið av samskiftinum verður skipað við eini felags høvuðsheimasíðu, har hvør skúli hevur sína undirsíðu. Verkætlanin hevur sína egnu heimasíðu, har til ber longu nú at lesa um ætlanina. Adressan er: www.idun.odin.dk"
Jógvan Edmund var rættiliga spentur at fara í gongd og áhugavert verður at frætta, hvussu fer at gangast og gagnast.

## Tykisskúlastovan

Ein av trupulleikunum við okkara skúlaskipan í dag er, at fleiri av bygdaskúlunum hava so fáar næmingar, at teir eldru næmingarnir ikki sleppa at velja tær lærugreinir, ið teir hava hug til. Tosað hevur verið nógv aftur og fram um at leggja kommunur saman og at leggja fleiri smærri skúlar saman í størri eindir, soleiðis at teir kunnu / skulu samstarva um hesar vallærugreinir. Vágafólk minnast við sorgblíðni fyrru helvt av sjeytiárunum, tá rótleysur ungdómur rakst um firðir og sund, og ikki bleiv hesi skipan langt lív lagað. Mær tykir, at tað er eina líknandi skipan, ið okkara skúlamyndugleiki ætlar at seta á stovn.
Her kundi ein tykisskúlastova møguliga avloyst hesa skipan í vissan mun. Her verður hugsað um eina skipan, har lærari og næmingar eru staddir á hvør sínum stað og samskifta við video og beinleiðis talu, soleiðis at bæði lærari og næmingar kunnu síggja, hvat fyriferst hvør hjá øðrum. Eisini ber jú til at víðka skúlastovuna út um landa- og heimspartamark. Hví ikki lata ein grønlendskan lærara undirvísa føroyskum børnum um Grønland ella onglending læra tey enskt?
Heilsuverk í fleiri londum nýta hetta longu í samband við skurðviðgerðir, ja hetta er roynt við donskum skurðlækna staddum í Danmark og skurðviðgerð á okkara Landssjúkrahúsið. Eisini hava fundir verið hildnir um tær sokallaðu videokonferencirnar við luttøku av m.a. Føroyum. Hví so ikki eisini nýta hesa skipan innan skúlagátt?

# Netmentan (netiqette)

## Ein lýsing av hugtakinum

Sera torført er at allýsa hugtøkini "moral" og "etik". Hyggja vit í donsk-føroysku orðabókina hjá H.P: Petersen verða bæði moralur og etikkur umsettir til *siðalæra*, so tað kann tykjast, at tey hava somu merking, men er hetta neyvan so, tá vit hugsa um dagligu nýtsluna av orðunum báðum. Orðið *mentan* hevur fingið tað einu merkingina "kultur" í føroysk-donsku orðabókini hjá M..A. Jacobsen og Chr. Matras. Tað fatanina, eg fari at halda meg til, er hon, at moralur er tað, sum vit innast inni kenna á okkum er skeivt, tí tað er ein inngrógvin partur av okkara uppaling, meðan etikkur er tað savn av reglum, ið vit hava lært at nýta í samband við eitthvørt høvi, t.d. í samskiftininum við onnur menniskju. Men samanumtikið kann sigast, at moralur og etikkur eru sera tætt knýtt at hvørjum øðrum og at tað viðhvørt kann vera ivi um, hvørt av hesum, eitt

fyribrigdi hoyrir til ella kanska til bæði. At umseta “etikette” til *mentan* er sostatt ífylgi orðabøkur okkara ikki heilt beint, men her vendist helst ikki aftur, tá vit tosa um føroyska heitið fyri “netikette”, nevniliga *netmentan*.
Flestu okkara eru nøkunlunda samd um, hvussu vit helst eiga at uppføra okkum yvir fyri øðrum menniskjum í vanliga traditionella samfelagnum – í mun til tað óveruliga “tykissamfelagnum”. Andlits til andlits megna vit so nøkunlunda at fylgja hesum reglum, men ikki er óvanligt at brot verða gjørd á hesar reglur í t.d. telefon, dulnevndum lesarabrøvum og nú á Alnótini. Tað er fyri mær sum um tað er í lagi fyri summi at uppføra seg vánaliga, bara eingin veit, hvør tú ert.

## Virginia Shea

Tá tú skalt viðgera netmentan er ilt at koma uttanum Virginiu Shea, ið hevur skriva bókina Netiquette.
Bókin, stórt hálvtannaðhundað síður fer víða um og viðgerð fleiri hugtøk og skipanir innan KT-samskifti, enn gjørligt hjá mær er at gapa um í skrivandi løtu, men kjarnin er tey 10 boðini, ið ljóða soleiðis á upprunamálinum:




Rule 1 an.
Rule 2. standards of behavior online
eal
Rule 3. e in cyberspace.
Rule 4. e's time and bandwidth.
Rule 5. good online.
Rule 6. edge.
Rule 7. rs under control.
Rule 8. e's privacy.
Rule 9. wer.
Rule 10 r people's mistakes.

At viðgera bókina verður ov drúgt á hesum sinni, men áhugaverd tykist hon at vera. Til ber at lesa hana ókeypis “on-line á adressuni: http://www.albion.com/netiquette/book/ eins og at keypa hana frá Amazon fyri $15.96

## Skúlans politikkur

Tað hevur verið til ampa hjá mær og fleiri at skúlin leggur tøkni, pening og tíð til eitt samskifti, ið ikki sømir seg fyri eitt mentað fólk. Her sipi eg til næmingasamskifti av tí slagnum, sum eitur “chat” við t.d. forritinum mIRC ella á Faroe_Chatt, ið eg havi fylgt av og á. Hesi kjakstøð hava tó eina skipaða netmentan, ið brúkararnir skulu halda seg til, men verður hetta ikki altíð, so vítt eg havi sæð, fylgt, tó tað eru tey, ið verða útblakaði úr skipanini.
Hvat gera vit so ella skulu vit yvirhøvur gera nakað við hetta? Jú, tað haldi eg. Fyrst av øllum eri eg glaður fyri, at vit hava fingið SamHøll inn um skúlagátt, har, sum kunnugt eingi huldufólk eru. Harnæst ber til tøkniliga at seta forðingar fyri, at slíkar skipanir kunnu nýtast. Frá nýggjárinum seinast er ikki gjørligt at nýta mIRC á okkara skúla. Faroe_Chatt er ikki stongt enn, men tað er kanska bara ein spurningur um tíð. Teir eldru næmingarnir hava grenja nakað og torført er at fáa teir at flyta hetta virksemi yvir í SamHøll, meðan lættari hevur verið við teimum yngru næmingunum, so kanska fer hetta at laga seg sum frálíðir.

Eg havi áður nevnt, at nógvir næmingar hava fingið sær ókeypis telduposta-adressu frá t.d. Hotmail, og kann hetta vera, tí teir ikki hava havt aðrar møguleikar, men møguliga fer eisini hetta at hæsa av sum frálíðir, nú allir næmingar hava fingið adressu í SamHøll.
Umframt tað fakligu hevur skúlin eisini eina uppalingarliga skyldu. Vanliga verður hetta í høvuðsheitinum lagt í lærugreinirnar føroyskt og kristni, men eisini í donskum og møguliga øðrum lærugreinum eisini. Eisini flokslærarin hevur ein stóran leiklut, eftir mínum tykki. Moralur og etikkur er jú ein náttúrligur partur av undirvísingini í kristni, og tá komi verður inn á samskifti við onnur menniskju, burdi tað, eftir mínum tykki, fallið náttúrligt at samanborið hetta við okkara samskifti á Alnótini og fingið tey at skilt samanhangin. Men til ber eisini at draga inn hóskandi tekstir í undirvísingina í føroyskum og donskum. Men sjálvur havi eg sett skjøtul á at bjóða øllum flokkunum í teldustovuna saman við flokslærara teirra, soleiðis at allir næmingar sum frálíðir eru upplærdir og kunnaðir um mína fatan í hesum sambandi, eins og flokslærarin hevur møguleika at fylgja tí upp.
Um mín fatan so er tann rætta, er ein heilt annar spurningur, men eg ætli at leggja støðið í samráð við lærararnar á tann hátt, at eg geri eitt upplegg, sum so verður viðgjørt á lærararáðsfundi ella í tí námsfrøðiliga ráðnum, tá tað einaferð kemur.
Hetta verður eisini galdandi fyri støðutakanini til tær heldur ivasomu heimasíðurnar við harðskapi, rasismu, nazismu, satanismu, porno og tílíkum. Men tað velst sjálvandi eisini um, í hvørjum sambandi summar av hesum síðum verða nýttar. Tað kann jú vera neyðugt at hava atgongd til t.d. nazismu ella rasismu í samband við eina næmingauppgávu.
Eisini haldi eg tað vera neyðugt at taka støðu til ólógligan tónleik, tær sokallu MP3-útgávurnar av vardum tónleiki, ið er lagdur á Alnótina uttan loyvi frá eigaranum. Henda spurning hava vit fyribils loyst soleiðis, at ikki ber næmingunum til at heinta fílur frá fílu-ambætarum, men er okkurt, ið neyðugt er at fáa fatur á, so ber til hjá læraranum at heinta tað.

# Kanning

Fyri at hava okkurt at halda meg til, fór eg undir eina spurnarkanning millum næmingar og lærarar okkara fyri at royna at lýsa, hvussu teldunýtsla teirra er í skúlanum og heima við hús, hvørji telduposta-forrit verða nýtt og hvørja støðu teir hava til tær ivasomu heimasíðurnar. Eg havi tíverri ikki havt stundir at viðgera úrslitið út í æsir men rákið er týðiligt. Tað verður ofta sagt, at tú í tílíkari kanning fært tað svar, tú ætlaði at fáa, og man nakað vera um hetta. Tað hevði mín áhuga at finna útav, í hvønn mun FirstClass verður nýtt í mun til onnur samskiftisforrit og tað má sigast at hava muna, at dentur hevur verið lagdur á at fáa lærarar og næmingar at nýta hetta forrit. Eisini ynskti eg at fáa at vita, um lærarar flestir eru samdir í mínum sjónarmiðum viðv. teimum ivasomu heimasíðunum, og tað tykist so. At nógvir næmingar ikki eru samdir, hevði eg væntað.
Úrslitið verður væntandi lagt fram í framløguni.

# Niðurstøða

Eg haldi, at eg so nøkunlunda havi nátt tí máli, eg setti mær og viðgjørt tey evni, ið nevnd eru í innganginum. Eg havi sett ljós á teir ymsu samskiftismøguleikarnar og nevnt hvørjar avmarkingar, teir hava. Eg havi viðgjørt tykissamfelagið og tykisskúlan, eins og netmentanin hevur verið havd á lofti. Eisini havi eg eftir førimuni viðgjørt skúlans politikk á økinum.
Kanska liggur tann største avmarkingin ikki í tøknini, men í okkara hátti at handfara hana. Eftir mínum tykki hava vit nógva tøkni innan skúlans gátt, sum vit ikki troyta til fulnar, og skulu vit nú tað? Vinnulívið, politikkarar og hægri skúlamyndugleikar hava stungið út í kortið, at vit øll skulu mennast á KT-økinum, tí har liggur framtíðin og kappingarføri okkara á handilsmarknaðinum. Men tað er ikki í hesum ljósi, at henda verkætlanin skal síggjast. Her verður einans hugsað um, hvussu vit kunnu troyta verandi tøkni til fyrimuns fyri tað fakligu innlæringina og samskifti við aðrar mentanir, og hvussu vit "eiga" at handfara hesi amboð í etiskum samanhangi, altso eitt amboð og ikki ein sjálvstøðug eind og nýtt á ein hátt, ið sømir seg einum mentaðum fólki.
Eitt, sum vit eisini eiga at hava í huga, er at fjarstøðan millum heimsins lond minkar við kunningartøknini, og vansin við at vit liggja so fjar úti í Atlanthavi minkar fyri hvørt ár, tá hugsað verður um at fylgja við í menningini, men trøini vaksa sum kunnugt ikki inn í himmalin. Við tí góða kemur tað ónda, vit mugu bara læra næmingarnar at nýta eitt rímiliga gott sold. At enda vil eg takka vegleiðara mínum, Kára Mortensen, KT-vørð í Hoydølum, fyri góða vegleiðing og góðan stuðul og vóni, at hann eisini hevur fingið nakað burtur úr samskifti okkara.

# Keldulisti

| | |
|---|---|
| The Alice Springs School of the Air | http://www.assoa.nt.edu.au |
| Med H. C. Andersen på fem danske småøer | http://www.uvm.dk/fsa/infotek/indhold/-eks/002/bt.htm |
| Virtuelt klasseværelse | http://www.uvm.dk/fsa/infotek/indhold/-temaer/frameset.htm |
| Tykissamfelagið Svínoy | http://www.idun.odin.dk |
| Netiquette av Virginia Shea | http://www.albion.com/netiquette/book/ |
| Usenet.dk | http://usenet.dk/netikette/ |
| Web-post | http://www.portal.fo/web |
| Hotmail | http://www.hotmail.com |
| Yahoo | http://www.yahoo.com |
| Jubii | http://www.jubii.dk |
| SamHøll | http://www.skulin.fo/login |
| Rabbe | http://www.rabbe.dk/fc.shtml |
| FirstClass | http://www.centrinity.com |
| Community | http://www.hotbucket.dk |
| Samrøða við Jógvan Edmund á Geilini, Svínoy | |

# *The Core Rules of Netiquette — Summary*

***Rule 1.* Remember the human.**

Never forget that the person reading your mail or posting is, indeed, a person, with feelings that can be hurt.

*Corollary 1 to Rule #1:* It's not nice to hurt other people's feelings.

*Corollary 2:* Never mail or post anything you wouldn't say to your reader's face.

*Corollary 3:* Notify your readers when flaming.

***Rule 2*. Adhere to the same standards of behavior online that you follow in real life.**

*Corollary 1:* Be ethical.

*Corollary 2:* Breaking the law is bad Netiquette.

***Rule 3*. Know where you are in cyberspace.**

*Corollary 1:* Netiquette varies from domain to domain.

*Corollary 2:* Lurk before you leap.

***Rule 4*. Respect other people's time and bandwidth.**

*Corollary 1:* It's OK to think that what you're doing at the moment is the most important thing in the universe, but don't expect anyone else to agree with you.

*Corollary 2:* Post messages to the appropriate discussion group.

*Corollary 3:* Try not to ask stupid questions on discussion groups.

*Corollary 4:* Read the FAQ (Frequently Asked Questions) document.

*Corollary 5:* When appropriate, use private email instead of posting to the group.

*Corollary 6:* Don't post subscribe, unsubscribe, or FAQ requests.

*Corollary 7:* Don't waste expert readers' time by posting basic information.

*Corollary 8:* If you disagree with the premise of a particular discussion group, don't waste the time and bandwidth of the members by telling them how stupid they are. Just stay away.

*Corollary 9:* Conserve bandwidth when you retrieve information from a host or server.

***Rule 5*. Make yourself look good online.**

*Corollary 1:* Check grammar and spelling before you post.

*Corollary 2:* Know what you're talking about and make sense.

*Corollary 3:* Don't post flame-bait.

***Rule 6*. Share expert knowledge.**

*Corollary 1:* Offer answers and help to people who ask questions on discussion groups.

*Corollary 2:* If you've received email answers to a posted question, summarize them and post the summary to the discussion group.

***Rule 7*. Help keep flame wars under control.**

*Corollary 1:* Don't respond to flame-bait.

*Corollary 2:* Don't post spelling or grammar flames.

*Corollary 3:* If you've posted flame-bait or perpetuated a flame war, apologize.

***Rule 8*. Respect other people's privacy.**

Don't read other people's private email.

***Rule 9*. Don't abuse your power.**

The more power you have, the more important it is that you use it well.

***Rule 10*. Be forgiving of other people's mistakes.**

You were a network newbie once too!

**Flokkur: _____ Kyn: ☐ G ☐ D**

# Spurnarblað
um teldunýtslu

*Set eitt 1-tal við tað, tú nýtir mest, 2-tal við næstmest o.s.fr.*

Nýtir tú teldurnar í skúlanum? ☐ JA ☐ NEI

Um ja, hvat nýtir tú teldunar til? ___Skriva ___Rokna ___Tekna ___Undirvísing ___Spæl ___Vitja heimasíður ___Teldupost ___Chatt ___Tónleik

Hevur tú teldu heima? ☐ JA ☐ NEI
Um nei, nýtir tú teldu hjá onkrum øðrum? ☐ JA ☐ NEI

Hevur tú internet heima? ☐ JA ☐ NEI

Um ja, hvat nýtir tú telduna til? ___Skriva ___Rokna ___Tekna ___Tónleik ___Spæl ___Vitja heimasíður ___Teldupost ___Chatt ___Annað

**Til tey, ið nýta teldupost:**

*Set eitt 1-tal við tað, tú nýtir mest, 2-tal við næstmest o.s.fr. og annars kross við hini, tú kennir.*

___Outlook ___Outlook Express ___FirstClass ___SamHøll ___Hotmail ___Annan teldupost

Eigur tað at vera loyvt at nýta hesi í skúlanum?

| | | | |
|---|---|---|---|
| mIRC | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| Chatt | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| Hotmail | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| Telduspøl | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |

Eiga næmingarnir at sleppa at vitja heimasíður við

| | | | |
|---|---|---|---|
| harðskapi? | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| rasismu? | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| nazismu? | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| satanismu? (*ógudiligar*) | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| porno? | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |
| ólógligum tónleiki | ☐ JA | ☐ NEI | ☐ VEIT IKKI |